# Hugnaligt kvøld saman við Brandi




**Sum eitt slag av upphiting til Summar Festivalin, spældi Brandur Enni og bólkur hansara í gjárkvøldið í Miðlahúsinum**

MIÐLAHÚSIÐ
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Hóast veðrið ikki var av tí besta, so var lagið gott á teimum á leið 30 áhoyrarunum, ið vóru komnir oman í Miðlahúsið at lurta eftir Brandi og hansara bólki.

Meðan bólkurin stemmaði gittarar og fingu alt tað síðsta uppá pláss, varð kaffi drukkið og smákøkur etnar í køkini. Smátt um smátt sessaðust áhoyrararnir, og Brandur fór í gongd.

Brandur hevur staðið framman fyri fólki nakrar ferðir eftir hondini, og tað sæst aftur. Brandur prátaði og livdi seg inn í framførsluna, og dugdi sum heild sera væl at fáa fólki at kenna seg væl.

At hjálpa sær hevur Brandur bæði kendar og ikki so kendar tónleikarar. Benjamin Petersen, ið spælir við Deja Vu, og Tróndur Enni, beiggja Brand, kenna flest øll, ið fylgja eitt sindur við innan føroyskan tónleik.

Men hóast restin av bólkinum ikki eru eins kend nøvn, so dugdu tey væl, og bólkurin spældi sum ein heild. Fiólspælið hjá Heiðrun Petersen riggaði serliga væl.

Brandur spældi í lítlan tíma og endaði við einum lagið, har hann spældi einsamallur við Heiðrun. Eitt pent lag við frálíkari útseting.

Eftir framførsluna var kaffi og smákøkur aftur á skránni, og onkur fjeppari fekk høvi at práta við Brand. Eitt hugnaligt og væleydnað kvøld.



# Spøkilsi í Grundini

**Áhoyrarnir í Grundini vóru tiknir á bóli av sera væleydnaðu konsertini hjá The Ghost**

G!
*Oddur á Lakjuni*
*oddur82@gmail.com*

Rættiliga nógv fólk vóru komin saman, táið duoin The Ghost spældu í Grundini.

The Ghost spæla elektroniskan teldutónleik, sum Urbanus Olsen og Filip Mortensen framleiða á teldu. Hetta er sera væl gjørt, og tað svingaði væl.

Filip er ein entertainari av fyrstu skuffu, og hann dugdi væl at fáa fólkini við uppá tað. Ta einu ferðina fór hann dansandi eftir garðinum og fekk øll at dansa við. Hann var ótrúliga sjarmerandi.

Hann sang ikki reint allatíðina, men í tí stóra og heila er ein hann er góður sangari. Røddin liggur høgt allatíðina og er rættiliga egin.

Næstsíðsti sangurin var eitt remix av sanginum “Dancing Around Honolulu” hjá The Story Ends. Thor Simonsen hevur remixað, og hann kom sjálvur á pallin at rappa við í sanginum.

Í síðsta sanginum “Something New” fór Urbanus í holtur við elgittaran, meðan Filip spældi kassagittar.

Filip endaði við at siga “We will definetely come back to The Faroe Islands. Beautiful view!”

Ljóðið var gott, og tjekkaði elektronikatónleikurin hjá The Ghost riggaði ótrúliga væl í Grundini.



# Tredje gang er lykkens gang

**Aftaná tveir føroyskar Petrar, Petur Pólson og Petur Háberg, var tíðin komin til íslendsku útgávuna, Petur Bén**

G!
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Íslendski Petur Bén var millum tey nøvnini, sum eg hevði á listanum yvir spennandi nøvn, ið máttu hoyrast.

Fyri nøkrum mánaðum síðani hoyrdi eg hann á Norðurbryggjuni, har hann einsamallur bergtók áhoyrararnar við sínum sangi og gittara. Av teimum báðum er tað serliga við gittaranum, at hann er í serflokki. Tí var tað sera spennandi at hoyra hann aftur á Spæliplássinum í kvøld við bólki.

Saman við Peturi á palli var ein trummuspælari og ein bassspælari. Ofta er tað torført at fylla ljóðmyndina við bert trimum ljóðførum, men tað megnaði tríbólkurin til fulnar.

Teir spældu gittargrundaðan popprokk, har Petur Bén var í fokus. Nakrir sangir vóru villir, meðan tað meiri stilla eisini slapp framat. Bæði sløgini eydnaðust sera væl. Kanska serliga ‘White Tiger’ og ‘Something Radical’ fangaðu. Men eisini ‘Billie Jean’, ið er eitt lag hjá (fyrrverandi) poppkonginum Michael Jackson, megnaði Petur at spæla á hegnisligan hátt

Fólk nutu framførsluna í góða veðrinum, og íslendingurin lat okkum eisini vita, at hann var sera glaður fyri Føroyar og fyri at vera her.

Ein stak góð framførsla, sum samstundis eisini livdi upp til mínar vónir.



# Væl skipaður larmur

**Spæliplássið var rættiliga fult, tá ið tungmálmsbólkurin SIC blásti alt um koll**

G!
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Meðan teir síðstu tónarnir vórðu spældir av The Ghost í Grundini, sum er eitt sindur burtur frá hinum báðum størru pallunum, sprændu SIC út sínar fyrstu, óndu tónar.

Fjepprararnir stóðu frammi við pallin og pikkaðu korn, meðan Mikkjal growlaði fyri lívinum. Stuttligt at síggja ein bólk, sum hevur eitt so heilstoypt image. Við svertu undir eygunum og myrkum klæðum spældu málmhøvdini, sum var hetta síðsta kvøldið nakrantíð.

Eitt stórt flagg, har SIC stóð við stórum stavum, fjaldi allan bakveggin á pallinum. Riggaði væl.

Eftir fadesuna í fjør, tá ið tekniskir trupulleikar fullkomiliga oyðiløgdu framførsluna hjá SIC, var tað ein fragd at hoyra, hvussu gott ljóðið var í ár. Serliganí hevur tað oftani verið trupuleikar við gittarljóðinum við tað, at alt rennur saman. Men hetta kvøldið var ljóði frálíkt. Ein hoyrdi sangin og øll ljóðførini væl, sum ikki hendir oftani, tá ið talan er um tungmálmstónleik.

Sum ein vinmaður kallaði tað; væl skipaður larmur.